**Christian Andreasen**
**vegna Fólkaflokkin**

**Helgi Abrahamsen**
**vegna Sambandsflokkin**

**Bill Justinussen**
**vegna Miðflokkin**

**Ruth Vang**
**vegna Framsókn**

**Kristin Michelsen**
**vegna Sjálvstýri**

Løgtingið

**Uppskot til samtyktar um mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi komandi 10 árini og uppskot til dagførdan orku- og veðurlagspolitikk**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at seta átøk í verk, sum minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30 prosentum komandi 10 árini í mun til útlátið í 2010. Ein dagførdur orku- og veðurlagspolitikkur verður karmur um tíðarfesta virkisætlan komandi árini.

**Viðmerkingar**
Løgtingið og landsstýrið hava tikið undir við[1] ávikavist Veðurlagssáttmálanum og París-avtaluni, sum nú leggja bindingar á heimsins lond um – eftir førimuni - at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, so hitalagið á jørðini ikki hækkar meira enn í mesta lagi 1,5-2,0 stig við aldaskiftið samsvarandi tilmælinum frá altjóða veðurlagsnevndini IPCC.

Okkara mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30 prosentum merkir, at í 2032 skal útlátið av vakstrarhúsgassi vera lægri enn 525.000 tons $CO_2$-eindir í mun til umleið 750.000 tons $CO_2$-eindir í 2010. Hildið verður, at talan er um ambitiøst mál, tí ein 30 prosent minking í mun til útlátið í 2010 svarar til nærum 50 prosent minking í mun til útlátið, sum tað var í 2020, tá samlaða útlátið fór uppum 1 mió. tons $CO_2$-eindir. Umroknað til olju merkir hetta, at oljunýtslan skal minka við einari helvt komandi 10 árini og fer hetta at raka allar útlátsbólkar í samfelagnum, sum vit kenna frá árligu uppgerðunum hjá Umhvørvisstovuni.

[1] Veðurlagssáttmálin er ein ST-rammusáttmáli, sum Løgtingið 2. desember í 1993 samtykti at taka undir við og undirtøka Føroya fyri Parísavtaluni varð fráboðað dønum 18. oktober 2016 aftaná ráðførslu við Uttanlandsnevndina.

Fyri at fyribyrgja ógvusliga upphiting av jørðini er altjóða tilmælið, at alheimsútlátið av vakstrarhúsgassi í 2030 skal vera 45 prosent lægri enn í 2010 og at nettoútlátið skal vera burtur í 2050. Samstundis verður álagt øllum londum – eftir førimuni – at seta sær egin mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Londini kring heimin eru ymisk og hava ymiskar fortreytir og ambitiónir fyri at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Summi lond seta sær hægri mál enn tilmælt, meðan onnur seta sær lægri mál, tó uttan at koma í andsøgn við krøvini í Veðurlagssáttmálanum og í Parísavtaluni.

Føroyska málið um 30 prosent minking verður hildið at vera í samsvari við grein 3, stk. 1 í Veðurlagssáttmálanum og grein 4 í Parísavtaluni, sum áleggja londunum eftir førimuni at verja verðurlagsskipanina og at áseta so víðtøkin ella ambitiøs mál, sum umstøðurnar í landinum loyva. Mett verður, at Føroyar kunnu seta enn hægri og meiri víðtøkin mál, tá brúkiligar og kappingarførar loysnir eru lætt atkomuligar hjá okkara skipaflota og tí skulu okkara mál regluliga endurskoðast.

**Orku- og veðurlagspolitikkur Føroya**

Eitt uppskot til orku- og veðurlagspolitikk, dagf. 15. apríl 2021, er gjørt við umleið 25 átøkum at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi. Uppskotið er hjálagt sum fylgiskjal. Uppskotið hevur verið í almennari hoyring og hevur verið viðgjørt í politisku flokkunum og í politisku skipanini. Tað er hetta uppskotið, sum hevur verið grundarlag undir politisku samráðingunum og sum er ætlað sum karmur fyri, hvørji átøk skulu fremjast komandi árini. Tað eru sjálvsagt aðrir møguleikar eisini og frameftir fara óivað fleiri at vísa seg, og tí er einki til hindurs fyri, at fleiri átøk koma, sum fara at gera sítt til, at vit skjótari koma fram á grønu leiðini. Uppskotið til orku- og veðurlagspolitikk varð lagt fram í 2021, og síðani eru árstølini broytt samsvarandi politisku ynskjunum, sí talvuna niðanfyri.

Breitt politiskt ynski er um at áseta eina ætlan og tíðarætlan fyri íverksetan av átøkunum, so borgarar, vinnan og politiska skipanin vita, hvat er í væntu komandi árini. Talan er eisini um eina ítøkiliggerðing av skyldunum, sum henda samtykt, Veðurlagssáttmálin og Parísavtalan leggja á verandi og komandi landsstýri, serliga í mun til lógar- og kunngerðasmíð og íverksetan av fyrisitingarligum átøkum. Samanumtikið kann sigast, at helvtin av átøkunum krevja nýggja ella broytta lóggávu, meðan hin helvtin er av fyrisitingarligum slagi, har ein partur eisini krevur eina víðkan og betran av almennum tænastuveitingum.

Øll 25 átøkini verða býtt út á næstu trý árini, tó við undantaki av átaki 9 (umhvørvisgjøld á oljurikin akfør) og átaki 24 ($CO_2$-avgjald á olju). Grannalondini og nógv onnur lond hava fyri tíð síðani lagt slík gjøld á, og verða slík gjøld mett av serfrøðingum sum eitt gott og neyðugt amboð fyri at fáa fólk at leggja um frá olju til grønar loysnir. Nú oljuprísurin er søguliga høgur, verður ikki mett rætt at koma við øktum oljuavgjøldum nú. Heldur eigur hetta at verða tikið upp um eini tvey ár, har mett verður um, hvørt tíðin tá er búgvin at áseta oljuavgjøld.

**Tíðarfest virkisætlan fyri íverksetan av átøkum**

| Ár | Átaksnr. | Slag | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| **2022** | 1 | Bjóða vindorku út | Er lagt til rættis fram til 2023/24 og leistur verður lagdur fram til 2030 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | 2 | Pumpuskipan | Loyvi latast |
| | 3 | Smærri vatnorkuverk | Skipan gerast av Umhvørvisstovuni og SEV |
| | 8 | Mvg-afturbering til el- og vetnisbilar | Leingjast til 2024 |
| | 11 | Banna oljufýr í nýggj hús og bygningar | Setast í gildi í 2024 |
| | 12 | Stuðul til at taka oljufýr niður | Setast í gildi í 2023 |
| | 14 | Lóggáva um fjarhita | Setast í gildi í 2023 |
| **2023** | 5 | Smá sólorkuverk | Skipan gerast av Umhvørvisstovuni og SEV |
| | 6 | Miðalstór sólorkuverk | Skipan gerast av Umhvørvisstovuni og SEV |
| | 7 | Stór sólorkuverk | Útboðsreglur í 2023 |
| | 10 | Grøn almenn ferðsla | Í gildi 2024-2026 |
| | 13 | Mvg-frítøka til góðkendar hitapumpur | Leingjast til 2025 |
| | 15 | Óheft orkuvegleiðing | Samstarv millum Umhvørvisstovuna og Landsverk |
| | 17 | Bíligari el-orka til ídnað fyri at umleggja frá olju | Prísskipan setast í gildi í 2024 |
| | 18 | Reglur um F-gass | F-gass stigvíst minkast sambært Kigalisáttmálanum |
| | 20 | Burðardygg býarmenning | Endurskoða býarskipanarlógina 2022-2023 |
| | 21 | Orkuvirkni hjá skipum | Setast í gildi í 2025 |
| | 22 | Stuðul til skipabygging | Endurskoða verandi lóg |
| **2024** | 4 | Vetnisframleiðsla og P2X | Greining gerast av US, SEV, Setrinum o.fl. og verða liðug í 2024 |
| | 16 | Orkumerk./bjálvingarsst. til eldri hús | Setast í verk í 2024 |
| | 19 | Avgjald á F-gass | Áseta avgjald við lóg |
| | 23 | Landstreym til skip | Skip skulu hava møguleika at keypa streym úr landi í 2025 |
| | 25 | Verja og endurbøta vátlendi | Skráseting og verndarátøk |

**Tvørpolitisk fyrireiking av komandi átøkum**
Í arbeiðinum at seta nevndu átøk í verk er ynskiligt, at landsstýrið arbeiðir tvørpolitiskt, so allir flokkar verða tiknir við upp á ráð, tá átøkini verða evnað til í smálutir. Eisini skulu kommunurnar dragast inn í arbeiði, sum krevja átøk í kommunala geiranum. Harumframt er umráðandi at lata viðkomandi áhugabólkar og -felagsskapir koma til orðanna um innihaldið í nevndu uppskotum.

**Ársuppgerðir og eftirmeting**
Í 2025 skal ein ávegis eftirmeting gerast, sum lýsir gongdina og hvørji átøk virka væl ella minni væl. Hetta er eitt krav sambært Parísavtaluni. Eisini skal støða takast til, um neyðugt er at rætta kósina fyri at røkka 10-ára málinum og um valda kósin slóðar fyri at røkka einum meira langtíðar máli um netto null útlát av vakstrarhúsgassi í 2050. Hesum máli hava Føroyar ikki arbeitt nógv við enn, men ætla at gera nógv meira við hetta, nú ítøkiligar loysnir hómast fyri at skipaflotan kann brúka meiri veðurlagsvinalig brennievni í framtíðini.

Umhvørvisstovan ger á hvørjum ári eina formliga og almenna uppgerð yvir útlátstølini fyri Føroyar. Hesi tøl verða fráboðað Sameindu Tjóðum. Árligu uppgerðirnar eru gott grundarlag til alment kjak um førda orku- og veðurlagspolitikkin.

**Á Løgtingi, 22. mars 2022**

Christian Andreasen    Helgi Abrahamsen    Bill Justinussen

Ruth Vang    Kristin Michelsen

**Hjálagt fylgiskjal:**
Fylgiskjal 1: Uppskot til Orku- og veðurlagspolitikk 2021-2030, útgáva 1, 15. apríl 2021